# Jón Rói á veg til Brøndby

**Stórtalentið Jón Rói Jacobsen er á veg til Brøndby, skrivar Ekstrablaðið. Men í HB siga tey, at tað er ov tíðliga at gera tað staðfestingina, hóast tað sær ljósari út**

FÓTBÓLTUR
*Ingi Rasmussen*

Ongin avtala er fingin upp á pláss enn, men samband er millum partarnar.

Soleiðis sigur Steinfinnur Mittelstein, stjóri í Havnar Fótbólti, nú líkt er til, at glið aftur er komið á samráðingarnar, sum skulu fáa unga stjørnuleikaran hjá HB, Jón Róa Jacobsen, til danska stórfelagið Brøndby.

Tað er Ekstrablaðið, sum fríggjadagin skrivar, at Jón Rói er á veg til Brøndby. Sambært blaðnum er hann ætlaður antin sum avloysari fyri framherjan Peter Madsen, ið er ávegis uttanlands, ella sum styrkur í verjuni, har hol skulu fyllast út. Men Steinfinnur Mittelstein avsannar, at nøkur avtala er undirskrivað enn.

– Jón Rói hevur so leingi verið á veg til Brøndby. Vit hildu einaferð í fjør, at tað var um at koma í rættlag, men so kom steðgur í prátið okkara millum. Nú tosa vit aftur saman, og tað sær eitt sindur ljósari út, men tað er ov tíðliga at siga, um Jón Rói fer til Brøndby í vár, sigur Steinfinn Mittelstein.

Jón Rói Jacobsen vandi við Brøndby, eftir at kappingarárið endaði í Føroyum, og hann hevur staðið seg væl í dystum fyri eykaliðið. Hann hevur eisini verið við á venjingarlegu saman við 1. liðshópinum, men nú er hann aftur í Føroyum og venur við HB.

Sum Sosialurin skilir, so er spurningurin í løtuni, um Jón Rói skal útleigast til Brøndby, ella um talan verður um keypssáttmála. Nógv er treytað av, hvat hendir við áleyparanum Peter Madsen, sum væntandi skrivar undir sáttmála við eitt útlendskt felag í vikuni. Brøndby hevur fíggjarligar trupulleikar, og tí er hugsandi, at teir heldur vilja leiga enn eiga.



*Jón Rói Jacobsen kann spæla í Brøndby í vár – helst í verjuni*

# TB skal uppaftur

**Fær TB ikki gongd á aftur hetta vikuskiftið, má teirra leiklutur í gullstríðnum metast sum liðugur**

KVINNU-FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tveir dystir verða leiktir í bestu flogbóltsdeildin hjá kvinnum um vikuskiftið.

Á Giljanesi verður kanska tann meira áhugaverdi av hesum, tá TB kemur á vitjan. Tað er eingin loyna, at TB hevði sett sær stór mál aftur í ár, tá farið varð undir endaspælið. Ætlandi skuldu allir dystirnir vinnast, men veruleikin er tó, at longu nú hevur TB rent seg í tveir ósigrar, og eru tær tí sigldar nakað afturum ÍF og Mjølnir á stigatalvuni.

Tí er tað eisini alt avgerandi fyri TB, at tær fáa fulla úrtøku hesaferð. Nakað sum avgjørt átti at verið gjørligt, um hugt verður eftir hinum dystunum millum liðini bæði. Dráttur hevur tó sýnt sera óstøðugt spæl í ár. Megna tær at toga seg heilt upp, kann væl henda, at tær fara at geva TB ein skarpan gang. Og um gestirnir tá ikki eru betri fyri, enn tær vóru seinasta vikuskifti, kann væl vera, at okkurt munagott eisini spyrst burturúr royndini.

Hin dysturin í kvinnudeildini verður í Havn, har Mjølnir kemur á vitjan. Við vanda fyri slitnum endurtøkum, so ber uttan til at staðfesta, at tað er langt ífrá soleiðis longur, at hetta er stórdysturin í føroyskum kvinnuflogbólti. Mjølnir eru snøgt sagt risafavorittar at vinna dystin, og so skuldi ikki verið meira at sagt um tað.

# So eigur Fram tørn

**Hetta vikuskiftið vitjar ÍF í Havn, har Fram ikki skal rokna við nøkrum sum helst**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Kappingin í mansflogbólti er í ár avmarkað til ein dyst, har trý lið berjast um silvurið, meðan eitt lið er ávíkavist nógv sterkast og nógv veikast.

Fyri at taka tað fyrsta fyrst, so hava fuglfirðingarnir snøgt sagt sýnt, at einki lið stendur teimum kurl í vetur. Skal nakar kunna skal teir, so skal tað kanska vera Fram, sum nú tekur ímóti. Ikki minst grundað á, at einastu settini, sum ÍF hevur mist í ár, vóru móti Fram, men ta ferðina mátti liðið vera týðandi leikarar fyriuttan, og við fullari manning er vandi fyri, at Fram fer at fáa somu lagnu, sum SÍ fekk seinasta vikuskifti.

Veikasta liðið er uttan iva Fleyr, sum enn eigur fyrsta settið til góðar. Og sum dystirnir hava verið, so tykist eitt slíkt at hava lang útlit. Hesaferð kemur Mjølnir á vitjan, og fyri plássið í silvurstríðnum er einki at ivast í, at talan eigur at verða um sigur, og helst so tryggan sum tilber.

# Kaggin í hølunum á føroyameistarunum

Støðan í 1. deild í føroyameistarakappingini í billard er tann, at Klaksvíkar Klubbi framvegis liggur á odda við 28 stigum. Men beint í hølunum á teimum liggur Billardfelag Kaggans, sum hevur 24 stig. Liðini spældu útidystir seinasta vikuskiftið og vunnu stórt. Klaksvíkingar vunnu 12-6 á Billardfelag Fuglafjarðar, meðan Kaggin vann 12-6 á Havnar Klubba. Vágbingar spældu eisini útidyst móti Tvøroyrar Klubba og tóku fullkomiliga fyrrverandi føroyameistararnar á bóli. Teir vunnu 16-2.

Enn eru ov fáir dystir spældir til at gera nakra niðurstøðu ella meting um, hvør fer at vinna gull, silvur og bronsuna og hvør fer at flyta niður í 2. deild, men kortini ber til at siga, at Havnar Klubbi og Tvøroyrar Klubbi mugu taka annað skinn um bak skulu hesi liðini hava møguleika at vera við í kappingini í oddaplássini. Tey eru eisini í niðurrykkjaravanda, tí fuglfirðingar hava nærum eins nógv stig.

Hyggja vit so at einstøku dystunum, so er tað Kaggin, sum í løtuni fellur tær flestu keylurnar. Liðið hevði eitt rættiliga høgt meðaltal, tá tað spældi í Havnar Klubba herfyri, so mikið høgt, at tað liggur framman fyri Klaksvíkar Klubba, tá talan er um eygu samanlagt. Tað má sigast at vera eitt sindur yvirraskandi, tá hugsað verður um, hvussu vælspælandi Klaksvíksliðið hevur verið nú í longri tíð ikki minst við sera høgum meðaltali. Men tað er við billard sum við øðrum ítróttargreinum – tað kann ganga báðar vegir í oddinum eisini.

Á Kaggaliðnum var Jan Müller bestur. Hann vann allar sínar dystir og hevði eisini besta meðaltalið uppá góð 23 eygu. Næstur honum var Carsten Hansen úr Havnar Klubbi, sum hevði ein framúr góðan dag. Hann vann tveir dystir av trimum og hevði knappliga 22 eygu í meðal. Triðjur var Bjarni Skaalum úr Kagganum við 4 stigum, síðani kom Steinbjørn í Dali við 2 stigum , Niels Nielsen úr Kagganum somuleiðis við 2 stigum og aftastur var Eirikur Nielsen við ongum stigi.

Klaksvíkingar taptu heldur óvantað 3 dystir í Fuglafirði. Men ein av orsøkunum var helst tann, at fuglfirðingar høvdu ein av gomlu elituspælarum sínum, Sofus Baldvinson við á liðnum. Hann vann tveir av dystunum, meðan Njál Petersen vann triðja dystin. Bestur í kappingini var Ólavur Kjølbro, sum vann allar sínar dystir og hevði eitt meðal uppá 16,5 eygu. Næstur honum var Sofus við 4 stigum og 16,4 eygum í meðal. Nr. 3 var Sonhard Johannesen úr KK við 4 stigum og 15 eygum í meðal. Hetta er í heldur lakara lagi fyri teir annnars keylufellandi klaksvíkingarnar.

Vágbingar komu, sóu og sigraðu, tá teir løgdu leiðina til Tvøroyrar herfyri. Bert ein dyst taptu teir móti teimum annars vælspælandi tvøramonnunum. Bestur í kappingini var Tórur við 6 stigum og einum meðal uppá 20,5 eygu. Næstur honum var Sámal P eisini úr Vági við fullum stigatali og 19 eygum í meðal. Vágbingar áttu eisini triðja mannin, Birgir, sum man teljast millum bestu spælarar í landinum, men sum hevur verið nógv burtur frá orsakað av arbeiði. Dysturin var eitt vónbrot fyri tvøramenn. Max Rasmussen, sum er ein av veteranunum í billardspæli í Føroyum hevði ein ringan dag. Tapti allar sínar dystir. Bestur maður á liðnum var Óli Joensen, sum vann einasta dystin.

## 2. deild

Í aðru deild er støðan tann, at fuglfirðingar liggja á odda við 18 stigum. Havnar Klubbi er nr. 2 við 17 stigum og Kaggin er nr. 3 við 12 stigum. Bæði liðin í Vági spældu móti hvørjum øðrum og har vann VB1 við 12-6. Bestur spælari í hesi kappingini var Hans J. Joensen úr VB1 við fullum stigatali. Klaksvíkar Klubbi vann á Tvøroyri við 18-0. Besti spælari var Torkil Jacobsen úr Klaksvíkar Klubba við seks stigum og góðum 13 eygum í meðal.

## 3. deild

Støðan í 3. deild er tann,at Klaksvíkar Klubbi er nr. 1 við 18 stigum. Nr. 2 er Kaggin við 18 stigum og nr. 3. er Vágs Billardfelag við 16 stigum. Ein dystur var millum Havnar Klubba og Tvøroyri. Havnamenn vunnu 10-8. Bestur var Wenzel P Husgaard við 6 stigum og góðum 5 eygum í meðal. Rókur Dimon úr Tvøroyrar Kluibba gjørdist nr. 2 við 4 stigum og góðum 6 eygum í meðal.

**Støðan í 1. deild**

| | | Dystir | Stig | Eygur | Umfør | Meðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Klaksvíkar Klubbi | 2 | 28 | 6694 | 360 | 18,59 |
| 2 | Billardfelag Kaggin | 2 | 24 | 7054 | 360 | 19,59 |
| 3 | Vágs Billardfelag | 1 | 16 | 3338 | 180 | 18,54 |
| 4 | Havnar Klubbi | 3 | 16 | 8848 | 540 | 16,39 |
| 5 | Tvøroyrar Billardfelag | 2 | 12 | 5548 | 360 | 15,41 |
| 6 | Billardfelag Fuglafjarðar | 2 | 12 | 5170 | 360 | 14,36 |

**Støðtan í 2. deild**

| | | Dystir | Stig | Eygur | Umfør | Meðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Billardfelag Fuglafjarðar | 2 | 18 | 4218 | 360 | 11,72 |
| 2 | Havnar Klubbi | 2 | 17 | 3526 | 360 | 9,79 |
| 3 | Billardfelag Kaggin | 1 | 12 | 2170 | 180 | 12,06 |
| 4 | Vágs Billardfelag 1 | 1 | 12 | 1846 | 180 | 10,26 |
| 5 | Tvøroyrar Billardfelag | 1 | 7 | 1364 | 180 | 7,58 |
| 6 | Vágs Billardfelag 2 | 1 | 6 | 1824 | 180 | 10,13 |

**Støðan í 3. deild**

| | | Dystir | Stig | Eygur | Umfør | Meðal |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Klaksvíkar Klubbi | 1 | 18 | 1928 | 180 | 10,71 |
| 2 | Billardfelag Kaggin | 1 | 18 | 100 | 180 | 0,56 |
| 3 | Vágs Billardfelag | 1 | 16 | 1160 | 180 | 6,44 |
| 4 | Tvøroyrar Billardfelag | 3 | 10 | 2834 | 540 | 5,25 |
| 5 | Havnar Klubbi | 2 | 10 | 928 | 360 | 2,58 |






**FORD ESCORT 1.8 HATCHBACK »DIESEL«**
Árg Dec. 96, Km 105.000.
Vælhildin í góðum standi.
Kr. 76.000,-



**KIA SEPHIA 1.5 GTX SEDAN**
Árg Mar-97, El. rútar- el. spegl
Centrallás-Spoylara- Alufelgur
v.m. Kr. 66.000,-



**FORD ESCORT STATIONCAR 1.8 »DIESEL«**
Árg okt.95, Km 104.500. Vælhildin í góðum standi. Kr. 74.000,-



**FORD ESCORT 1.8 »DIESEL«**
Árg Okt. 95, Vælhildin . Centrallás -Radio v.bandspælara-El.Spegl v.m. Kr. 64.000,-

**FORD MONDEO 1.8 TURBO DIESEL**
Árg Aug.98, Km 90.000.
Vælhildin:Fjarðstýrt centrallás-Aircondition-hiti í setrum-El rútar/spegl v.m. Kr. 135.000,-



**MAZDA 626 2.0 HATCHBACK**
Árg Nov. 96, Km 66.000. Vælhildin . Centrallás -El rútar -Radio v.bandspælara-El.Spegl .
Kr. 95.000,-



**DAEWOO NUBIRA 1.6 STATIONCAR**
Árg Juni.98, Km 29.000. Sera vælhildin. El rútar Fr. Takboylar, Radio við bandspælara, Centrallás, Sleipikrók.Bert km 29.000.
Kr. 94.000,-

**P/f D. B. Bilar**
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**

INPACT INTERNATIONAL

## Grannskoðari

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***, sum er elsta grannskoðaravirkið í landinum, søkir eftir grannskoðara at byrja 1. mars.

Viðkomandi skal hava HH ella líknandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur at hava royndir á økinum, men ikki ein treyt.

Arbeiðið hjá einum grannskoðara er sera fjøltáttað, og fevnir eitt nú um hesi øki:

- Bókhaldshjálp, so sum avstemningar, uppgerðir v.m.
- Grannskoðan
- Roknskaparuppseting
- Skatt
- Ráðgeving innan roknskap, skatt, fígging v.m.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til Grannskoðaravirkið INPACT, stílaður Jógvani Amonsson, í seinasta lagi 28. januar 2003.

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisor
R. C. Effersøesgøta 26 · Postrúm 191
110 Tórshavn
Tlf. +298 314700 · Telefax +298 313815
T-postur: inpact@inpact.fo

## Politiskur pallborðsfundur

**Mánakvøldið 27. januar kl. 19.30 skipar Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag fyri pallborðsfundi við einum umboði frá hvørjum flokki.**

Heitið á fundinum er "**Suðuroyggin í 21. øld**" og fylgjandi evni, sum øll hava við Suðuroynna at gera, verða viðgjørd:
- Samferðslunetið í oynni
- Samferðslumøguleikar við restina av landinum, herundir eisini ferðakostnaður
- Framtíðarútlit fyri vinnu, útbúgvingar, førleikakrevjandi størv, trivnað og fólkatal
- Eitt útjaðaraálit varð framlagt - hvat so?
- Løgtingið var og vitjaði í Suðuroynni, hvat meta tingmenn um viðurskiftini í Suðuroynni?

Fundurin verður skipaður soleiðis, at fyrst fáa pallborðsluttakararnir 5 min. í part. Síðan verða spurningar frá fundarfólki, og at enda fáa pallborðsluttakararnir 2 min. í part



**Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag**

*sveinur søkist*

*Salong Sól & Klipp*
*Smyrilsvegur 6*
*Tlf. 312511*



**Ellis- & avlamisheimið í Vágum**

## Fótterapeutur

Søkt verður eftir einum autoriseraðum fótterapeuti til heimið at byrja skjótast tilber.

Arbeiðstíðin er mett at vera ein dag um vikuna.

Møguleiki er fyri at hava onnur viðskiftafólk framíhjá.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Helenu Joensen, leiðara á heiminum, tlf. 332600 ella 332601.








**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3493
**Navn:** Sp/f Krea
**Adressa:** Undir Kletti, 600 Saltangará
**Kommuna:** Runavíkar Kommuna
**Stovningardato:** 14.01.2003
**Viðtøkudato:** 14.01.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Oddmar Suni Olsen, Undir Kletti, 600 Saltangará, Poul Martin Anthoniussen, 650 Toftir, Egil G. Olsen, Nýggivegur, 620 Runavík og Bárður S. Hammer, Heiðavegur, 600 Saltangará.
**Stjórn:** Oddmar Suni Olsen, Undir Kletti, 600 Saltangará.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
**Grannskoðari:** Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skáli.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 14.01.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at veita internettænastu, ráðgeving og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 23. januar 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3489
**Navn:** Sp/f SD 2002
**Adressa:** Leitisgøta 24, 160 Argir
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 06.12.2002
**Viðtøkudato:** 06.12.2002
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Súni Danielsen, Leitisgøta 24, 160 Argir.
**Stjórn:** Súni Danielsen, Leitisgøta 24, 160 Argir.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** Sp/f Eyðfinn Guðjónsson, Tórgarðsgøta 13, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 06.12.2002 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka HVS og múraraarbeiði, keyp og sølu og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 23. januar 2003*

*Kristin Balle*